LM-067/2022

Føroya Kærustovnur
Undir Hornabakka · Postrúm 45 · 110 Tórshavn · Tel. 320585 · fks@fks.fo · www.fks.fo

Umhvørvis- og vinnumálaráðið
Gongin 7
Postrúm 377
FO-110 Tórshavn

Tórshavn, 16. mars 2022
Málsnr.: 22/05708
(at tilskila í svari)
Viðgjørt: RC/ge

Ummælisskriv til uppskot til Løgtingslóg um náttúruvernd (Náttúruverndarlógin).

Vísandi til lógaruppskot sum er borið í Løgtingið, LM-096/2021: Uppskot til Løgtingslóg um náttúruvernd (Náttúruverndarlógin), eru niðanfyri viðmerkingar Føroya Kærustovns til lógaruppskotið.

Víst verður á, at lógaruppskotið varð sent Føroya Kærustovni til hoyringar og at Føroya Kærustovnur ikki hevur latið nakað hoyringsskriv, sjá *pkt. 1.5 í upprunauppskotinum.*

Rætt er, at Føroya Kærustovnur upprunaliga ikki hevur latið viðmerkingar til uppskotið, tá hetta var í hoyring. Orsøkin til tess er, at í upprunaliga lógaruppskotinum, sum varð sent Føroya Kærustovni til hoyringar, var ikki talan um, at Føroya Kærustovnur var kærumyndugleiki, soleiðis sum ásett er í § 35 í lógaruppskotinum, sum er borið í Løgtingið og sum hevur fingið málsnummar LM-096/2021.

Talan er sostatt um, at ein fyri Føroya Kærustovn púra grundleggjandi broyting er gjørd í lógaruppskotinum, eftir at Føroya Kærustovnur hevur havt uppskotið til hoyringar og áðrenn uppskotið er borið í Løgtingið.

Tað er í ljósinum av omanfyri lýstu hoyringstilgongd, at Føroya Kærustovnur kemur við sínum viðmerkingum til lógaruppskotið, aftaná at lógaruppskotið er borið í Løgtingið.

Fíggjarligar og umsitingarligar avleiðingar fyri Føroya Kærustovn
Víst verður í lógaruppskotinum á, at umsitingarligu og fíggjarligu avleiðingarnar fyri Føroya Kærustovn í fyrstu syftu helst ikki verða stórar, men at hesar sum frá líður møguliga kunnu vaksa við tíðini, sjá *pkt. 2.1 og 2.2. í lógaruppskotinum.*

Yvirskipað skal Føroya Kærustovnur vísa á, at náttúruverndarøkið er púra nýtt og eisini grundleggjandi øðrvísi í mun til virksemi hjá Føroya Kærustovni annars. Talan er eisini um eitt ógvuliga umfatandi og fjøltáttað øki.

Føroya Kærustovnur er ein stovnur í støðugari menning og virkisøkið hjá Føroya Kærustovni verður eisini javnan víðkað, tað verið seg annaðhvørt við víðkan av verandi økjum ella við yvirtøku av heilt nýggjum økjum. Royndirnar hjá Føroya Kærustovni hesum viðvíkjandi eru, at tað kann vera ógvuliga trupult, at gera eina neyva meting av fíggjarligum og umsitingarligum avleiðingum og at hesar metingar í øllum førum ikki einans kunnu byggjast á eitt mett tal av kærum.

Føroya Kærustovnur
Undir Hornabakka · Postrúm 45 · 110 Tórshavn · Tel. 320585 · fks@fks.fo · www.fks.fo

Metingin má byggja á eina heildarmeting, har hædd verður tikin fyri fleiri viðurskiftum, soleiðis at økið kemur í eina trygga legu, har skipanin við kærugongdini frá byrjan virkar sum hon skal.

Tá Føroya Kærustovnur fær eitt nýtt øki at umsita, sum er umfatandi og øðrvísi enn virksemi annars, fer ein størri tilgongd í gongd á Føroya Kærustovni. Umframt at hópin av formligum viðurskiftum og mannagongdum skulu skipast, so skal yvirlit fáast yvir eitt nýtt, umfatandi og torskilt øki. Eisini er neyðugt, at Føroya Kærustovnur ognar sær eina rúgvu av nýggjari vitan og førleikum, soleiðis at kærugongdin á náttúruverndarøkinum verður tryggjað eina høga góðsku og smidliga gongd frá fyrsta degi av.

Talan er sostatt um eitt munandi fyrireikingararbeiði, sum skal gerast, samstundis sum vunnin vitan og førleikar allatíðina skulu haldast við líka og dagførast.

Politiska tilgongdin at skipa náttúruverndarøkið hevur verið drúgv. Ætlanir at skipa økið, hava áður verið frammi í ymsum líki og Føroya Kærustovnur hevur eisini fyrr, í ein ávísan mun, á ein hátt ella annan, verið partur av hesum tilgongdum.

Í mars 2019 bar Landsstýrismaðurin í Heilsu- og innlendismálum løgtingsmálið LM-140/2018 í Løgtingið til viðgerðar. Hetta var uppskot um at víðka Kærunevndina í lendismálum til eisini at umfata náttúru- og umhvørvismál. Av politiskum orsøkum datt uppskotið burtur, men hugleiðingarnar og metingarnar í uppskotinum, geva eitt gott grundarlag undir, at meta um umsitingarligu- og fíggjarligu orkuna sum krevst, til tess at umsita kærugongdina á náttúruverndarøkinum.

Sagt verður í omanfyrinevnda uppskoti, at orsøkin til uppskotið m.a. er, at við at flyta kærugongdina frá aðalráðnum til Føroya Kærustovn, verður arbeiðsorka leysgivin, soleiðis at størri arbeiðsorka er í aðalráðnum til aðrar uppgávur, sjá *Kapittul 1. Almennar viðmerkingar.*

Víðari verður í uppskotinum mett, at uppskotið fer at hava við sær, at Føroya Kærustovni fer at tørva ein royndan løgfrøðing afturat at fyrireika náttúru- og umhvørviskærumál og mælt verður til, at hækka játtanina til Føroya Kærustovn við kr. 660.000, sjá *pkt. 2.1 og 2.2 um fíggjarligar og umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.*

Víst verður eisini á, at talið av kærum í fyrstu syftu verður mett at vera í mesta lagi 10. Vísandi til, at talan er um umfatandi, trupul og nýggj mál, og at talið av kærum helst verður vaksandi við tíðini, so metir Føroya Kærustovnur, at talan verður um eina munandi arbeiðsbyrðu, at fyrireika seg til móttøku av, og skilagóða avgreiðslu av, málum av hesum slagi.

Soleiðis sum uppskotið til Náttúruverndarlóg fyriliggur, so sæst ikki orsøk til at seta til síðis metingina hjá Heilsu- og innlendismálaráðnum í 2019 í mun til økta arbeiðsbyrðu og fíggjarligar og umsitingarligar avleiðingar.

Føroya Kærustovnur fer staðiliga at mæla til, at umfangið og týdningurin av hesi uppgávu verður tikin í størsta álvara og at hetta sjálvandi endurspeglast í játtanini hjá Føroya Kæurstovni, soleiðis at fyrireikingin og umsitingin av hesum stóra, trupla og nýggja øki verður so skynsam og góð sum til ber.

Føroya Kærustovnur
Undir Hornabakka · Postrúm 45 · 110 Tórshavn · Tel. 320585 · fks@fks.fo · www.fks.fo

Ásetingar um kærufreist í Náttúruverndarlógini

Vísast skal á, at Føroya Kærustovnur við løgtingslógini um Føroya Kærustovn, við gildi frá 1. januar 2022, hevur verið fyri umskipan við stórum broytingum, har m.a. fyrstu kærunevndirnar eru avtiknar og hesi virkisøki eru flutt til Føroya Kærustovn.

Eitt av høvuðsendamálunum við løgtingslógini um Føroya Kærustovn, og umskipanini av Føroya Kærustovni sum heild, varð, at felags reglur skuldu vera fyri málsviðgerðina á stovninum. Sambært viðmerkingunum til løgtingslógina um Føroya Kærustovn, er lagt upp til, at útgangsstøðið skal vera, at somu málsviðgerðarreglur eru fyri alla viðgerð á Føroya Kærustovni. Í stuttum kann sigast, at um ikki annað er ásett í serlóg, verða øll mál viðgjørd eftir grundreglunum í fyrisitingarlógini og við reglunum um Føroya Kærustovn sum bakstøði.

Ásett er í § 35, 2. pkt. í uppskotinum til Náttúruverndarlóg, at kærufreistin er fýra vikur frá degnum, tá ið kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina. Í § 2, stk. 2 í løgtingslógini um Føroya Kærustovn er ásett, at um ikki annað er ásett, er freistin at kæra 4 vikur frá tí degi, kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina. Rættarstøðan av báðum ásetingunum er sostatt eins, tá kærufreistin verður rokna á sama hátt í báðum førum.

Havandi í huga, at ásetingin um kærufreist í uppskotinum til Náttúruverndarlóg ikki hevur til endamáls, at áseta eina øðrvísi rættarstøðu enn hana, sum frammanundan er ásett í løgtingslógini um Føroya Kærustovn, er ásetingin um kærufreist í uppskotinum til Náttúruverndarlóg óneyðug. Tískil mælir Føroya Kærustovnur til at strika ásetingina um kærufreist í § 35, stk. 2 í uppskotinum til Náttúruverndarlóg.

Hesar vórðu í fyrstu syftu viðmerkingar Føroya Kærustovns til uppskotið til Náttúruverndarlóg.

Vegna Føroya Kærustovn

Rani Debes Christiansen,
løgfrøðingur